Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

## Tinghúsið aftur fyri skotum

### *Oddagrein*

EFTIR øllum at døma er tað ein kongstanki hjá formansskapinum í Løgtinginum, at løgtingshúsið skal broytast. Nú verður knappliga farið at umvæla og umbyggja húsið, uttan at Tingið sjálvt veit nakað um ætlanina. Eingin nýggj kapping hevur verið um útsjónd, og heldur ikki er arbeiðið boðið út alment.

SJÁLVANDI skulu vit hava eitt virðiligt tingshús og sjálvandi skal Tingið hava góðar og sømiligar umstøður at virka undir. Tað var tí rætt, at undanfarni løgtingsformaður tók spurningin upp at umbyggja ella byggja nýtt Løgtingshús. Tí varð eisini boðið til arkitektakapping, sum so føroyskt so føroyskt endaði við, at einki varð bygt. Løgtingsmenn hveptu seg helst við at fara at brúka einar hálvthundrað milliónir krónur – ella allarhelst fleiri – til eitt nýtt løgtingshús. Helst tí at so nógv annað liggur á láni.

HARAFTURAT tók ein mótstøða seg uppímóti at ríva verandi hús niður. Eini 4-5000 túsund fólk skrivaðu undir eitt mótmæli. Tað merkir, at tað nærum var ein fólkarørsla ímóti at broyta tinghúsið. Av hesi orsøk høvdu óivað tey flestu roknað við, at tinghúsið fekk frið. Tað er fitt, har tað stendur, og tað fellur væl inn í umhvørvið við Vaglið, hóast tað má ásannast, at tað er ikki nakað arkitektoniskt prýði.

MEN hvat skal so gerast við tinghúsið? Tað vita hvørki tingfólk ella almenningurin. Tað sigur nakað um, at mannagongdin kann ikki vera røtt. Hvørki nú, ella á sinni, tá arkitektakappingin varð lýst. Tá avgjørt var at hava eina arkitektakapping, átti Tingið fyrst havt tryggjað sær, at undirtøka var fyri at byggja húsið. Fyrst og fremst millum løgtingsfólk, sum skulu játta fígging, men eisini millum býráðslimir, sum umboða fólkið í Havnini.

NÚ verður upplýst, at útsjóndin skal nærum broytast til ta útsjónd, sum tinghúsið hevði undan at tað varð bygt um í 1977. Skifurtak skal leggjast á og vindeyguni skulu skiftast út til vindeygu við smærri gluggum. Harafturat skal tað málast grátt! Tá nú einki nýtt hús skuldi byggjast, og fólk vildu varðveita tinghúsið sum tað var, er spurningurin, hví húsið so skal broytast og umbyggjast. Er flagtekjan ikki nóg góð? Lekur hon ella rívur hon á vetri. Ella eru vindeyguni longu rotin?

EITT er at sambyggja tinghúsið við bygningin hjá Telefonverki Føroya Løgtings, sum bygningurin í síni tíð kallaðist, har skrivstovur skulu gerast einaferð, eitt annað er at broyta broytingar fyri fleiri milliónir, sum eru óneyðugar. Føroyingar vilja hava eitt gott ting, men Løgtingið verður ikki betri, hóast takið fær skifur og húsið fær nýggj vindeygu.

***Sosialurin***

# Ása Hátún hevur framsýning í Sveis

*Ása Hátún úr Havn hevur hesa vikuna eina framsýning í Wintherthur í Sveis, har hon sýnir fram list, sum hon hevur virkað úr ull*



Stefan í Skorini

Framsýningin byrjaði týsdagin 15. august, seinasti framsýningardagurin verður fríggjadagin 25. august.

Týskvøldið byrjaði framsýningin við eini konsert har Monika Stauss-Joensen og Helene Ringgenberg spældu verk eftir Schnittke, Grieg, Balazs og Svendsen. Monika er sveisari, men búsitandi í Leirvík, og hon spælir violin.

Eftir konsertina hildu Willi Gohl og Ólavur Hátún talu og settu harvið framsýningina.

Í gjár var fyrsti dagur á framsýningini, og Ása er at hitta hjá teimum vitjandi framsýningardagarnar.

Sunnudagin verður skipað fyri einum Føroya kvøldi, har fyriskiparararnir borðreiða við føroyskum mati, og eisini verður føroyskur tónleikur á skránni. Frí atgongd verður til hetta tiltakið.

Mikudagin 23. apríl fáa tey vitjandi so møguleikan at síggja, hvussu Ása Hátún arbeiðir við ullini, tá ið hon fer at siga frá sínum arbeiði. Eisini fáa gestirnir møguleika at arbeiða listaliga við ull eins og Ása.

Framsýningin endar fríggjadagin 25. august.

# Russar veiddu mest í juli

*Russisk skip høvdu størstu veiðuna í juli mánaða, og størsti parturin var makrelur*

Stefan í Skorini

Tilsamans veiddu útlendsk skip 8215,9 tons í føroyskum sjógvi í juli mánaða. Fremst vóru russar, sum fingu 3095,6 tons. Størsti parturin var hjá russum var makrelur, sum teir veiddu 2548,6 tons av, meðan restin var svartkjaftur.

ES londini samanlagt veiddu 2593,7 tons, og íslendsk skip veiddu 1880 tons. Íslendingar veiddu bara svartkjaft, meðan ES londini høvdu lítið av øðrum fiskasløgum enn svartkjafti.

Av ES londunum var tað Danmark, sum hevði størstu veiðuna. 2120 tons av svartkjafti var danska veiðan í juli mánaða. Hetta var eisini størsta veiðan av teimum fimm ES londunum, sum hava roynt í føroyskum sjógvi í ár. Tey eru Holland, Danmark, Bretland, Týskland og Frakland.

Í føroyskum sjógvi veiddu tey útlendsku skipini nógv mest av svartkjafti. 4547 tons av svartkjafti, meðan 2548 tons vórðu veidd av makreli.

Russar hava eisini veitt mest samanlagt í ár. 80553,9 tons eru tikin til høldar í føroyskum sjógvi í ár. Norðmenn eru næstir, og teir hava veitt 46876,8. ES londini og Ísland hava eina veiðu á umleið 13000 tons hvør.

Svartkjaftur hevur sum vanligt verið mest veiddur av útlendskum skipum í føroyskum sjógvi. 135.980 tons eru veidd av svartkjafti í føroyskum sjógvi higartil í ár.

# Ragnar Thorseth álvarsliga skaddur

*Norski ævintýrarin og føroyavinurin Ragnar Thorseth liggur álvarsliga løstaður á sjúkrahúsið í Noregi, aftaná at hava verið óheppin á hestbaki*

Jógvan H. Gardar, Oslo

Norski ævintýrarin Ragnar Thorseth liggur álvarsliga skaddur á Regionssykehuset í Tróndheimi. Thorseth var óheppin á hestbaki, og datt og meiddi seg illa í høvdið. Vakthavandi lækni á sjúkrahúsinum, Johan Arnt Heggvik sigur í samrøðu við tíðindastovuna NTB, at er støðan álvarslig, men stabil. Thorseth var seinnapartin týsdagin ikki komin til vits aftur.

Ragnar Thorseth var fyri fáum vikum síðani í Føroyum, ávegis til Íslands við eini norskari stavkirkju. Hetta var ein gáva frá Noregi til Íslands í samband við at tað eru 1000 ár síðani Ísland bleiv kristnað. Hann var tá skipari á Kvitserk, ið er ein eftirgerð av einum víkingaskipi. Hann er rættiliga vælkendur millum føroyingar, og hevur vitjað Føroyar fleiri ferðir við sínum eftirgerðum av víkingaskipum. Best kenda fer hansara var við Saga Siglar fyri góðum tíggju árum síðani.

**Óheppin á hestbaki**

Tað var sunnukvøldi at Ragnar Thorseth var farin út at ríða saman við tveimum øðrum. Sjálvur var Thorseth nakað aftanfyri fylgisveinarnar. Tá so hesturin hjá Ragnar Thorseth kom einsamallur skiltu fólk at okkurt var galið. Ragnar Thorseth var funnin uttan vit. Rokna verður við at hann er dottin av hestinum og høvdið hevur rakt við ein stein ella ein betongkant.



# Trolbátar tvungnir at bróta lógina

*Trolbátarnir á landleiðini eru kroystir at bróta lógina og kasta fisk útaftur, tí myndugleikarnir standa fyri teimum, føra teir ov stóru hjáveiðuna til lands*



*Alfred Olsen, løgtingsmaður fyri Eysturoynna, heldur, at fiskidagaskipanin ikki er góð nokk, tí hon tvingar trolbátarnar at kasta ov stóru hjáveiðuna fyri borð aftur*

Dia Midjord

– Vit kunnu ikki hava eina skipan, sum førir við sær, at fiskur verður blakaður aftur í havið, sigur Alfred Olsen, løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin í Eysturoynni.

– Tað sigur seg sjálvt, at trolbátarnir ikki koma til lands við ov stóru hjáveiðuni, um teir verða revsaðir, sigur hann og leggur aftrat, at hann í hesum sambandi hevur hoyrt upphæddina 50.000 krónur nevnda.

**Óliðilig skipan**

Alfred Olsen sigur, at skipanin við fiskidøgum býtur seg eitt sindur í stertin, um trolbátarnir fáa bøtir fyri at hava meir enn 25 prosent av toski í hjáveiðu.

– Tískil má ein onnur loysn finnast.

Hann sigur eisini, at trolbátarnir hava bjóðað seg til at lata ov stóru hjáveiðuna til Einkjugrunnin ella til grunnin fyri óarbeiðsførar fiskimenn. Men hetta er sum at tosa fyri deyvum oyrum.

– Í so máta er skipanin eisini alt ov stirvin, sigur hann.

– Eitt brek við útgerðini kann føra til, at ov nógv av toski kemur í trolið. Tá kann tað ikki vera rætt at revsa trolbátarnar, heldur Alfred Olsen, løgtingsmaður fyri Eysturoynna.

**Mótsigandi skipan**

Níggju av trolbátunum, sum fiska á landleiðini innan fyri tólvfjórðingar, vórðu kannaðir av Vaktar & Bjargingartænastuni fyrr í ár. Onkur hevur fingið og aðrir fáa bót fyri ov stóru hjáveiðuna.

Og júst henda bótin ger, at trolbátarnir í dag eru tvungnir at tveita ov stóru hjáveiðuna fyri borð aftur. Hetta er ikki í tráð við fiskidagaskipanina, tí grundtankin við henni er, at allur fiskur skal førast til lands og síðani tilvirkast.

## Signar á skránni seinni í vikuni

*Tjóðveldisflokkurin fer á fundi seinni í hesi vikuni at umrøða málið um Signar á Brúnni*

Dia Midjord

Ein skerdur Tjóðveldisflokkur hevði vanligan floksfund týskvøldið. Frákoyrdi landsstýrismaðurin Signar á Brúnni var til staðar, men málið um hann bleiv kortini ikki viðgjørt.

– Hvat, ið er hent aftan á kanningina, verður viðgjørt á fundi seinni í hesi vikuni, sigur formaður Tjóðveldisfloksins Høgni Hoydal.

Hetta var avgjørt eftir einum ynski frá Signar á Brúnni, tí floksfundurin týskvøldið ikki var so væl mannaður.



*Á fundi seinni í hesi vikuni fer Tjóðveldisflokkurin at viðgera, hvat er hent síðani kanningin av Signari á Brúnni var liðug*

# Sethúsaprísirnir pumpaðir upp

*Innrás av ali- og oljufólkum í høvuðsstaðnum ger, at stór sethús við góðum útsýni fara fyri okurs-prís. Hinumegin tunnilin fara líknandi hús fyri bíligan penga*



Dia Midjord

Sambært Jonhardi Dahl-Jacobsen, húsameklara, er prísurin á sethúsum í Havn methøgur í løtuni.

– Serliga lætt er at selja størri sethús í mið- og eysturbýnum, sigur húsameklarin.

– Fert tú ígjøgnum tunnilin til Kollafjarðar ella Kvívíkar, so er prísurin dumpaður rættiliga nógv, sigur hann og leggur aftrat, at einar 700 túsund gott kunnu verða á muni á nærum somu húsum.

Og húsameklarin heldur, at í Havn er tað kanska ov nógv av tí góða.

– Tá eini 20 ára gomul hús kosta meir enn eini spildurnýggj hús, tá er okkurt galið, sigur húsameklarin, ið er útbúgvin byggifrøðingur.

– Tú skalt minnast til, at tá hús eru eini 25 ár, skulu vindeygu, hurðar og annað skikftast, sigur hann.

**Sama mynstrið**

Tað er einki at dylja yvir, at innrásin av ali- og oljufólkum seinastu tíðina, hevur sett ferð á sethúsaprísin í høvuðsstaðnum. Og nøkur hús fara fyri ein prís, sum flestu bert kunnu droyma um.

– Hetta er sama søgan, sum hetlendingar vóru ígjøgnum, tá oljan kom til teirra land, sigur Jonhard Dahl-Jacobsen.

– Eg veit um, at onkur hús eru farin fyri dupultan prís, og tað havi eg ongantíð upplivað áður, sigur húsameklarin.

Hann leggur dent á, at dygdin ikki hevur tað nógva at siga. Húsið skal vera stórt, liggja væl fyri og hava góðar atkomumøguleikar.

– Hetta eru hús, sum skulu brúkast til bæði íbúð og skrivstovu, sigur hann.

